

Okkara 33. ár í mótaheiminum halda vit frá í dag til jóla

Vaksin:
33% avsláttur av øllum frakkum og útijakkum

Børn:
33% avsláttur av gummistivlum std. 25-35

Handilin er á tremur við nýggjum klæðum fyri danskar prísir

NOA NOA®
Telefon 318200
Telefon 518200
Tróndargøta 27

Upplatingartíðir:
Mánadag - hósdag........ 10-18
Fríggjadag...................... 10-19
Leygardag...................... 10-16

Jólagávur kunnu býtast um heilt fram til 3. januar

Luttak í jólakappingini hjá Noa Noa og ver við í lutakastinum um eitt gávukort á kr. 2.000,-

# Ein innbjóðing til harra Johan Dahl

Tá Føroya Landsstýri fyri tveimum árum síðani bjóðaði privatum íleggjarum at keypa partabrøv í Atlantic Airways, lovaði landsstýrið ikki at blanda seg upp í raksturin av flogfelagnum. Undir tínari leiðslu er hetta broytt.

Sjálvt um vit mótmæltu, skifti tú vælvirkandi nevnd felagsins út og setti tínar egnu menn í nevndina. Tú hevur broytt raksturin hjá floghavnini; nakað sum ikki varð upplýst, tá partabrøvini vórðu seld, so inntøka er flutt frá flogfelagnum til eina almenna fyritøku.

Úrslitið av hesum er, at flogferðaseðlaprísirnir eru hækkaðir, og partabrøvini verða næstan ikki handlað longur. Eingin seriøsur íleggjari ynskir at eiga ein minnilutapart í einum flogfelag, sum verður rikið av einum politikkara.

Fyri átta mánaðum síðani bóðu vit teg fylgja tí, sum landsstýrið lovaði teimum privatu íleggjarunum. Tú bað okkum um at hava álit á tær. Sambært avtalu, løgdu vit fram trý uppskot, sum hvørt sær kundi loyst trupuleikan á nøktandi hátt:

- at landsstýrið keypir okkara partabrøv aftur fyri útveganarprísin, ella
- at landsstýrið selur sín meirilutapart fyri útveganarprísin, ella
- at landsstýrið umskipar okkara partabrøv til B-partabrøv við fastlæstari rentu.

Vegna landsstýrið lovaði tú at viðgera hesi uppskot við vælvilja.

Nú eru átta mánaðir gingnir, uttan at vit hava hoyrt nakað frá tær.

Hetta snýr seg um, hvat er rætt og rímiligt. Hetta er ein spurningur um álit.

Vit ynskja ikki at fara inn í eitt rættarmál. Tað verður dýrt og tekur tíð. Men tygum geva okkum onki val. Málið loysir ikki seg sjálvt.

Tá hampulig fólk gerast ósamd, seta tey seg niður og finna eina loysn. Vit heita á teg um at fáa hetta í rættlag. Vit eru tilreiðar at hitta teg – ella ein og hvønn, sum landsssýrið tilnevnir at finna eina rímuliga og sámuliga loysn á hesum máli.

***Adrian Noskwith***
London, England